# 48000 hvílandi limir

**Johan í Kollafirði heldur, at veljarakanningin vísir eitt skeivt úrslit, og at endaliga valúrslitið fer at geva honum nógv fleiri atkvøður enn so. Um úrslitið er rætt, er tað sambært kollfirðinginum ein staðfesting av, at í Føroyum finnast 48000 hvílandi limir, sum ikki hava skilt boðskap hansara**

VELJARAKANNING
*Kristian E. Andersen*

– Úrslitið av kanningini er skeivt. Hon vísir ikki tað úrslit, sum verður. Eg fara at fáa meira atkvøður enn hatta, sigur Johan í Kollafirði, tá Sosialurin í telefonini greiðir honum frá, at hann sambært nýggju veljarakanningini ikki sleppur inn á ting.

Johan í Kollafirði heldur áfram við at siga, at um úrslitið nú er rætt, so merkir tað, at veljarin ikki hevur skilt boðskap hansara, ið sigur, at hvør einstakur føroyingur má umhugsa støðu sína og ikki bert velja sama flokk sum abbin.

– Um veljarin fangar mín boðskap, so fái eg fleiri atkvøður enn hetta. Um tey ikki fanga boðskapin, ja so fái eg ikki fleiri atkvøður. Tað er einfalt. Føroyingar mugu vakna og taka seg saman. Annars er henda kanning bert ein staðfesting av, at tað finnast 48000 hvílandi limir í Føroyum, leggur kollfirðingurin afturat.

### Meira barnsligur

Johan í Kollafirði ásannar, at hann má broyta framferðarhátt fyri at fáa sín boðskap í gjøgnum og fáa føroyingar at skilja hann.

– Eg verði nokk noyddur at fáa boðskapin niður á eitt lægri støði fyri at fáa føroyingin at skilja hann. Eg má vera meira barnsligur, tá eg tosi við fólk. Tað hjálpir kanska, sigur formaðurin í Hinum stuttliga flokkinum.

### Fingur í spælinum

Johan í Kollafirði heldur annars, at slíkar veljarakanningar hava stóra ávirkan á valúrslitið. Tær kunnu avgera eitt val, og ávirka lagið hjá valevnunum.

– Um tú nú hevði fortalt mær, at eg fekk 100% av atkvøðunum, so hevði eg leikað í allan dag. Men nú frátekur veljarakanningin mær drívmegi, tí hon fortelur mær, at tað gongur lort. Tað keðiliga við veljarakanningum er, at tær hava ein fingur við í spælinum í tí endaliga úrslitinum. Alt fær fólk at velja øðrvísi, sigur Johan í Kollafirði, sum at enda leggur dent á, at hann ikki er vónbrotin, og at hann fer at dríva á komandi vikuna.

# Fullveldissamgongan er søga

**Føroyski veljarin ynskir eina broyting. Tað er greiða niðurstøðan hjá Anfinni Kallsberg av úrslitinum í veljarakanningini. Hann væntar eitt ómetaliga spennandi val, har úrslitini í smærru valdøminum fáa stóran týdning**

VELJARAKANNING
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Over and out. Løgmaður Anfinn Kallsberg ásannar, at sjálvstýrissamgongan seinastu seks árini er nú endaliga slitin. Fólkið ynskir eina broyting og tey eru ivaleyst troytt av øllum rokinum, sum hevur verið seinastu tíðina, sigur formaðurin í Fólkaflokkinum.

Hann heldur, at broddurin er tikin av sjálvsstýrismálinum í valstríðnum, og høvuðsmálið hjá undanfarnu samgongu fer eftir øllum at døma at fáa minni týdning í føroyskum politikki í framtíðini

Anfinn ber stóran ótta fyri, at ein møgulig samgonga millum Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin hevur við sær, at einki fer at henda í sjálvstýrismálinum, og tað heldur løgmaður vera stórt spell.

### Marginalar avgera

Sambært veljarakannigini, sum Sosialurin og Fynd hava gjørt í samstarvi við Føroya Tele, fær sitandi samgongu ikki fleiri14 tinglimir. Flokkurin hjá løgmanni, Fólkaflokkurin, fær í veljarakanningini seks tinglimir og tað er ein færri enn á seinasta løgtingsvali.

Anfinn Kallsberg heldur ikki, at veljarakanningini skal tulkast sum ein framaná til Fólkaflokkin. Hann rør framundir, at Fólkaflokkurin er í fleiri valdømum rættiliga tætt við at vinna onkran tingmann afturat.

– Valið hesaferð verður ómetaliga spennandi. Tað vera teir smáu marginalarnir sum fara avgera nógv. Sambært kanningini eru vit involveraðir í tøttum dystum í Norðstreymi, Sandoy og Vágoynni, og tað kann skjótt koppa báðar vegir, sigur formaður Fólkafloksins.

Hann leggur afturat, at Fólkaflokkurin stendur seg vanliga betur á sjálvum valinum enn í veljarakanningunum, og tí hevur flokkurin gott treyst til valið.

Anfinn Kallsberg nevnir veljarakanningarnar undan løgtingsvalinum í 2002, har flokkurin lá á góðum 17 %, men tá avtornaði endaði Fólkaflokkurin við góðum 21 %.

Jenis av Rana:

# Úrslitið burdi verið betri

**Jenis av Rana, formaður Miðfloksins, er ikki nøgdur við úrslitið av veljarakanningini, sum gevur flokkinum 4,1 prosent og ein eykavaldan tinglim**

VELJARAKANNING
*Stefan í Skorini*

– Tað bæði kundi og burdið verið betri, er fyrsta viðmerkingin hjá Jenisi av Rana, tá hann verður spurdur um veljarakanningina, sum Fynd og Sosialurin hava gjørt í samstarvi við Føroya Tele.

Hann er ikki serliga væl nøgdur við úrslitið hjá hansara flokki, sum bert gevur honum ein tinglim, sum allarhelst fer at vera í Suðurstreymoyar valdømi. Tí eru útlitini hjá formanninum at blíva afturvaldur góð.

– Tað er eingin ivi um, at hetta er eitt vónbrot fyri okkum, men vit skulu minnast til, at hetta bert er ein kanning, og ikki nakað endaligt úrslit, sigur Jenis av Rana.

Hann ger vart við, at Miðflokkurin mangan hevur staðið seg illa í veljarakanningum, og tí vónar hann, at úrslitið verður munandi betri á valinum.

– Við seinasta val hevði flokkurin fleiri sera vánalig úrslit í veljarakanningum, og í onkrari teirra fingu vit ongan mann valdan. Tí trúgva vit framvegis uppá eitt betri úrslit enn hendan kanningin gevur okkum.

Jenis troystar seg við, at Miðflokkurin var tann seinasti flokkurin at kunngera sína valskrá, og tað var fríggjadagin. Hendan kanningin er sostatt gjørd áðrenn, Miðflokkurin almannakunngjørdi sína valskrá. Formaðurin vónar tí, at framløgan av valskránni fer at geva flokkinum nakrar fleiri atkvøður og harvið nærkast tí næsta manninum eins og í 1994, tá Miðflokkurin fekk tveir mans.

### Góða undirtøku í Eysturoynni

Miðflokkurin fær annars best undirtøku í Eysturoyar valdømi, har flokkurin fær 6,0 prosent. Vanligt er at siga, at tað kostar einum flokki atkvøður at sita í landsstýrinum, men hetta sæst ikki aftur hjá Miðflokkinum í Eysturoynni.

Bill Justinussen hevur verið landsstýrismaður síðan síðsta val, og tað sær út til, at hetta hevur givið flokkinum fleirir atkvøður í Eysturoynni.

– Tað er sjálvandi arbeiðið hjá Bill, sum ger, at vit fáa so góða undirtøku í hansara valdømi, sigur Jenis av Rana.

Miðflokkurin hevur annars ein spennandi lista í Suðuroy, men hetta gevur ikki flokkinum størri undirtøku í hesum valdøminum, tí bert kanningin gevur flokkinum bert tvey prosent í Suðuroy.

– Vit fara at spíla okkum út ta næstu vikuna fyri at vinna okkum størri undirtøkur. Minsta málið hjá okkum er sjálvandi at fáa ein mann afturat, sigur Jenis at enda.

Kári P. Højgaard:

# Ikki nøktandi úrslit

**– Tað er ikki nóg gott, at vit liggja um sperrumarkið, sigur formaður Sjálvstýrisfloksins, Kári P. Højgard, sum kortini hevur góðar vónir til valið**

VELJARAKANNING
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Formaðurin í Sjálvstýrisflokkinum, Kári P. Højgaard, er ikki nøgdur við úrslitið av nýggjastu veljarakanningini hjá Sosialinum og Fynd í samstarvi við Føroya Tele.

– Tað er ikki nóg gott, at vit liggja um sperrumarkið. Ein flokkur sum Sjálvstýrisflokkurin eigur at klára seg betri og fáa størri undirtøku, sigur Kári P. Højgaard.

Veljarakanningin gevur Sjálvstýrisflokkinum 3,9% av samlaðu atkvøðunum, og hetta er bert 0,2% frá sperrumarkinum fyri at sleppa inn um tinggátt.

Egnar útrokningar við støði í seinasta vali vísa, at Sjálvstýrisflokkurin varðveitir mannin í Eysturoynni, men tað er heilt tætt við Suðurstreymoy. Flokkurin fær størstu prosentvísu undirtøkuna í Norðoyggjum við sjey prosentum.

– Søguliga eru vit sterki í Norðoyggjum og Eysturoynni, men vit eiga sjálvandi at vera betri fyri í einum so stórum valdømi sum í Havn við fleiri enn 11.000 veljarum, sigur Kári P. Højgaard.

### Sterkari listar

Kári P. Højgaard vil ikki beinleiðis kalla tað ein fyrimun, at Sjálvstýrisflokkurin í veljarakanningum nærmast hevur verið spáddur at doyggja út.

– Tað hevur havt tann fyrimun, at fólk vaknaðu. Tað er týdningarmikið, at Sjálvstýrisflokkurin er við í føroysku politikkinum, og flokkurin á miðjuni hevur nógvar stuðlar, sigur Kári.

Hann heldur so avgjørt, at valevnalistarnir hjá flokkinum eru sterkari til hetta valið í mun til tað seinasta.

– Flokkurin er væl fyri til hetta valið við góðum valevni, og vit eru eisini uppstillaði í øllum valdømum. Tí hevði eg eisini roknað við einum betri úrslitið, sigur Kári P. Højgaard.

### Fyrivarni

Formaður Sjálvstýrisfloksins missir kortini langt frá mótið av hesari veljarakanningini.

– Til seinasta val gav ein líknandi kanning okkum ongan tingmann, men tá valúrslitið var greitt, so kláraði vit okkum væl betri, enn kanningin segði, og hesum rokni eg eisini við hesaferð, sigur Kári P. Højgaard.

Og tað skal nógv til fyri at taka mótið frá formanninum.

– Eg trúgvi til tað síðsta, at vit fáa eitt so gott úrslit, at vit bæði koma inn á ting og kanska fáa tveir tingmenn, sigur Kári P. Højgaard.

Veljarakanningin gevur Sjálvstýrisflokkinum 3,9% av samlaðu atkvøÝunum, og hetta er bert 0,2% frá sperrumarkinum fyri at sleppa inn um tinggátt.

Egnar útrokningar við støði í seinasta vali vísa, at Sjálvstýrisflokkurin varðveitir mannin í Eysturoynni, men tað er heilt tætt við Suðurstreymoy. Flokkurin fær størstu prosentvísu undirtøkuna í Norðoyggjum við sjey prosentum.

– Søguliga eru vit sterki í NorÝoyggjum og Eysturoynni, men vit eiga sjálvandi at vera betri fyri í einum so stórum valdømi sum í Havn við fleiri enn 11.000 veljarum, sigur Kári P. Højgaard.




Tórbjørn Jacobsen
www.dnag.dk




Nú ræður um at telva rætt - vel Tjóðveldisflokkin

Valevni Tjóðveldisfloksins
í Eysturoy

Tjóðveldisflokkurin
www.tjodveldisflokkurin.fo

Høgni Mikkelsen



Gott vinnulív - betri samfelag

Valevni Sambandsfloksins
í Suðurstreymoy

Sambandsflokkurin
www.samband.fo

Joan Ziskason
jozi@post.olivant.fo



Ábyrgdarfullur fíggjar- og búskaparpolitikkur førir millum annað ein tryggan eldrapolitikk og ein álítandi heilsupolitikk við sær!

nakað fyri
Valevni
Javnaðarfloksins
í Suðurstreymoy

Javnaðarflokkurin
www.javnadarflokkurin.fo

Jóannes Eidesgaard



"Politikkurin komandi árini skal snúgva seg um tey menniskju, sum her búgva.

Vit mugu fáa veruligu virðini inn aftur í føroyskan politikk, virði, sum leggja lunnar undir tað góða samfelagið"

nakað fyri
Valevni
Javnaðarfloksins
í Suðuroy

Javnaðarflokkurin
www.javnadarflokkurin.fo

Andrias Petersen




nakað fyri
Valevni
Javnaðarfloksins
í Eysturoy

Javnaðarflokkurin
www.javnadarflokkurin.fo

Elin Lindenskov



Eitt modernað norðurlenskt samfelag

www.lindenskov.com

javnaðarflokkurin

Stuttan boðskap til fólkið
- siga lýsingaserfrøðingarnir

Her hevur tú møguleikan at fáa tín boðskap fram,
fyri ein bíligan pening. Ring til Duritu ella Finnbjørg

Sosialurin

ARGJAVEGUR 26 · FO-160 ARGIR · TEL 341800 · FAX 341801 · WWW.SOSIALURIN.FO · POST@SOSIALURIN.FO